## Ólafur Ragnar heiðraður

Íslendski forsetin, Ólafur Ragnar Grímsson, fær Nehruheiðurslønina, sum varð stovnað til minnis um indiska politikaran Jawaharlal Nehru. Indisku myndugleikarnir boðaðu í gjár frá, at íslendski forsetin fær heiðurslønina fyri árið 2007 og kemur hann sostatt í hóp saman við so kendum persónum sum eitt nú Martin Luther King, Nelson Mandela og Móðir Teresa. Umframt heiðurin fær Ólafur Ragnar Grímsson einar 700.000 krónur.



*Ólafur Ragnar Grímsson verður heiðraður í India (Mynd: Vísir)*

## Út við vinarpolitikkinum

Herfyri skrivaði stjórin í grønlendska flogfelagnum Air Greenland, Michael Binzer, at vinar- og kenningapolitikkur er alt ov vanligur í Grønlandiog hevur kostað grønlendska samfelagnum fleiri hundrað milliónir krónur. Nú fær hann undirtøku frá Uffe Ellemann-Jensen, fyrrverandi uttanríkisráðharra, sum var formaður í Royal Greenland eitt skifti. Við Politiken sigur hann tað vera óheppið, at politikkur og vinnulív eru so nær tengd í Grønlandi.

# Halda 70 ára dagin hjá Charley Pride í Klaksvík



**Í sambandi við 70 ára føðingardagin hjá Charley Pride verður skipað fyri tiltaki í Klaksvík hóskvøldið**

TÓNLEIKUR
*Eyðun Klakstein*
*eydun@sosialurin.fo*

Charley Frank Pride var føddur hin 18. mars 1938 í býnum Sledge í Missisippi USA. Sum unglingi droymdi hann um at gerast professionellur baseball spælari og fekk eisini sáttmála sum slíkur, men tónleikari skuldi gerast hansara lívsstarv, tí umframt baseball byrjaði hann eisini sum heilt ungur at spæla uppá gittar.

Fyrstu ferð Charley Pride kom á Billboard Hot Country Songs var í desember 1966 við lagnum Just Between You and Me. Men tað var í 1971 við singulplátuni “Kiss an Angel Good Mornin’, at Charley Pride slerdi navnið hjá sær fast við 12 tumma seymi í country tónleikaheimin.

Síðani tá hevur Charley Pride havt 36 løg sum nummar eitt á listanum hjá Billboard Hot Country Songs, og hevur hann tilsamans hava selt 70 milliónir plátur um allan heim.

- Charley Pride hevur nógvar fjepparar í Føroyum, og tí verður skipað fyri hesum tiltaki at halda 70 ára føðingardagin hjá honum, sigur Karl Sofus Heimistovu, sum hevur lagt tiltakið til rættis.

Charley Pride hugnakvøld á Fortuna hósdagin 10 apríl kl. 19.00. Á skránni verður filmur um Charley Pride, Petur Rouch fer at halda fyrilestur, og borðhald verður.

Kostnaður fyri alt tiltakið er 225 krónur. Tilmelding kann gerast á tlf. 218111 í seinasta lagi mikudagin 9. apríl.

# Sjálvstýrisflokkurin hittir veljarar

**Hvønn hósdag hevur Sjálvstýrisflokkurin opið hús á gamla apoteki. Nýggja tiltakið kallar flokkurin Tingstovan**

POLITIKKUR
*Eirikur Lindenskov*
*eirikur@sosialurin.fo*



*Sum eina roynd hevði Sjálvstýrisflokkurin opið hús seiansta hósdag, har valevni og onnur hitta tingmanningina*

Hósdagin fer Sjálvstýrisflokkurin á tingi undir eitt nýtt tiltak við heitinum Tingstovan, har møguleiki verður at koma á gátt í flokshølunum hjá flokkinum á Gamla Apoteki. Endmálið er at lata upp fyri tættari sambandi við veljaran og geva fólki møguleikan at koma á tal við tingbólkin.

Flokkurin sigur í tíðindaskrivi. at í Tingstovuni fáa fólk møguleikan til eitt prát við tingbólkin um mál, sum hava teirra áhuga.

- Tingbólkurin vónar á henda hátt at fáa íblástur og upplýsingar frá fólki, sum hava innlit í ymisku málini, sum koma fyri á tingi. Vónandi fara fólk at, ið hava eitthvørt upp á hjarta, at nýta hetta høvið at gera sína ávirkan galdandi, sigur flokkurin.

Tá Tingstovan hevur opið hús, verður eisini ein drekkamuður og ein breyðbiti at fáa.

Sum eina roynd hevði Tingstovan opið hús seinasta hósdag fyri valevnum og øðrum. Hetta eydnaðist sera væl, og vóru øll samd um, at hetta var eitt gott tiltak.

Tingstovan hjá Sjálvstýrisflokkinum, á Gamla Apoteki á Áarvegi 2 í Havn, verður opin hvønn hósdag millum klokkan 12.00 og 13.30, hetta til tingið fer heim í summarfrí – og øll eru vælkomin, sigur Sjálvstýrisflokkurin.

## Nýggj viðgerðarstova

**Tann 1. apríl byrjaði byrjaði Heri Kragesteen, aut.cand.psyk., sum sjálvstøðugur vinnurekandi sálarfrøðingur. Viðtaluhølið er í húsunum í Tórsgøtu 17, har tríggir aðrir sálarfrøðingar eisini húsast**

VINNULÍV
*Jákup Mørk*
*jakup@sosialurin.fo*

Um førleikar og royndir kann í stuttum verða nevnt, at Heri Kragesteen seinastu sjey árini hevur virkað sum leiðandi sálarfrøðingur á Psykiatriska deplinum, og áðrenn tað undirvísti hann í sálarfrøði fyri komandi lærarum og námsfrøðingum á Læraraskúlanum. Annars hevur hann arbeitt við børnum og ungum sum kliniskur sálarfrøðingur á Sernámsdeplinum umframt at hann eftir loknan lestur starvaðist á Stolpegården í Gentofte. Umframt drúgvar royndir við viðgerð, sálarfrøðiligum kanningum, undirvísing, supervisjón og ráðgeving, er eisini talan um royndir við at leggja til rættis og skipa fyri stytri skeiðum við sálarfrøðiligum evnum.

Viðgerðartilboðini eru vend móti bæði einstaklingum, familjum og bólkum umframt stovnum, kommunalum og teimum hjá landinum. Tilgongdin ástøðiliga og verkliga er merkt av einari samanrenning av dynamiskari og systemiskari hugsan, umframt at hann eisini brúkar sonevndar kognitivar terapeutiskar tilgongdir.